# Hjartaleysi Ólavur fekk nýtt hjarta í síðstu løtu



**Tey síðstu árini hevur hvør dagur hjá Ólavi Thune verið ein bardagi móti deyðanum. Ólavur yvirlivdi í fyrsta umfari takkað verið einum mekaniskum hjarta, sum at enda ikki var nóg mikið. Sosialurin hevur hitt Ólav og konu hansara Jonu. Tey greiða frá hesi sera dramatisku søgu, har hvør løta kundi verið tann seinasta hjá Ólavi**

Reportasja




Óli Jákup Jacobsen


Ólavur Thune, føddur Justinusen, er føddur 10. september 1979 í Streymnesi. Hann hevur ongantíð verið ein sum hevur ligið á latu síðuni. Barna- og ungdómsárini hava verið merkt av nógvum likamligum aktiviteti, har Ólavur bæði hevur róð kapp, spælt fótbólt, gingið á fjalli o.s.fr. Ikki ánaði hann tá, at soleiðis skuldi hansara lív ikki halda fram.



*Alt tað Ida kann minnast, hevur hon javnan vitjað pápa sín á Ríkissjúkrahúsinum*



*Eisini Jenny mátti frá fyrsta degi venja seg við, a fleiri tímar um dagin, var ein partur av gerandisd*

## Deyðasjúkur frá degi til dags

Tá ið lívið hjá Ólavi enn var sum hjá teimum flestu, møtti hann í 2001 eini gentu úr Runavík, ta eitt ára yngru Jonu. Tey blivu væl og vórðu tey trúlovað stutta tíð eftir. Fyrsta tíðin sum trúlovað var sum vera man merkt av gleði og kæti. Ikki vistu tey, at ógvuliga harðir sjógvar lógu í nærmastu framtíð.

Ólavur hevði tvær systrar, sum frá barni av høvdu ringt hjarta. Tær vórðu tó ikki mettar at vera í serligari vandastøðu. Í februar 2003 fór elsta systurin, Synnøve, til Danmarkar til kontrol.

– Tá ið læknarnir sóu støðuna hjá Synnøve, vórðu teir skakaðir. Sama dag, ið Synnøve var innløgd til kanningar, fekk hon hjartasteðg. Støðan var so kritisk, at bert ein mánað seinni varð hon løgd undir skurð fyri at fáa eitt mekaniskt hjarta, sokallað Heartmate 1. Undir skurðviðgerðini orkaði kroppurin hjá Synnøve ikki meira, og andaðist hon á skurðborðinum 24. mars 2003, einans 27 ára gomul, sigur Ólavur.

Hann leggur aftrat, at hetta var ógvuliga hart fyri Jonu, seg og alla familjuna.

– Ein mánaður er ikki long tíð frá at vera næstan frískur til at liggja í kistuni, sigur hann.

Um hesa somu tíð byrjaði Ólavur at merkja, at kroppurin orkaði minni og minni. Hann helt tað tó loyniligt í fyrsta umfari. Á arbeiðsplássinum byrjaðu menn at halda hann vera í so dovnan, men Ólavur royndi av øllum alvi at fylgja við. Eisini spældi Ólavur innandurafótbólt. Men Jona sá, at alt ikki ruggaði rætt, tá ið hann var bæði gulur, bláur og grønur eftir lokna venjing.

Spurdur, hví hann ikki fór til kanningar beinanvegin, svarar Ólavur:

– Eg tordi ikki.

– Eg tordi ikki at hugsa møguleikan, at tað kundi ganga mær sum systrini, so eg leyg fyri mær sjálvum, at hetta nokk mundi fara at ganga yvir, sigur hann.

Tá Ólavur so einaferð var í Danmark til kanningar saman við hinari systir síni, Maud, spurdi læknin av reinari tilvild, um Ólavur hevði hug til at verða kannaður. Hann føldi, at alt ikki var, sum tað átti, og valdi hann tí at taka av tilboðnum. Boðini vóru skakandi:

Hjartað pumpaði við 40% kraft! Frá at hava verið »frískur« dagin fyri, var hetta sum at fáa ein ordiligan frammaná. Hetta vóru eini ógvuliga tung boð at fáa.

– Av allari mótgongd, vit hava møtt á leiðini, hevur hetta verið tann størsta. Synnøve var júst deyð av hesi somu sjúku, og nú vóru tað brádliga vit, sum stóðu fyri skotum, sigur Jona.

– Alt hendi í senn. Fyrst doyði Synnøve í mars. Síðan varð í mai staðfest, at Ólavur var álvarsama sjúkur, og sum um tað ikki var nóg mikið, so bleiv hin systurin, Maud, sett á bíðilistan til nýtt hjarta í juni sama ár. Eftir trimum mánaðum vóru lívini hjá okkum púra endavend, og var hetta ein sera torfør tíð, sigur Jona.

Ólavur nikkar játtandi. Lagnan vildi heldur ikki, at Maud skuldi klára tað, og andaðist hon í januar 2005, einans 32 ára gomul.

## Torført at knýta vinarbond

Við eini so álvarsliga sjúku sum hjá Ólavi og við at vera so tætt bundin at sjúkrahúsinum, kemst ikki uttan um at møta fólki í somu støðu. Soleiðis er tað eisini hjá Ólavi og Jonu. Gjøgnum hesa tíðina eru tey komin at kenna heilt nógv fólk við líknandi sjúku. Tað er rættuliga náttúrligt, at ein verður tætt knýttur at hvørjum øðrum. Trupulleikin er bara, at tílík vinarbond ikki vara so leingi. Fleiri ferðir hava Ólavur og Jona fingið tey tungu boðini, at aftur eitt av teirra vinfólkum hevði givið upp.

– Tað var ein drongur, ið var eitt ár yngri enn eg, og sum eg var serliga tætt knýttur at. Vit

Sosialurin